## Lærlingur til
## INTERSPORT
## Tórshavn og Glyvrum

**Søkt verður eftir lærlingum til Intersport í Tórshavn og Glyvrum**

Starvið fevnir um alt vanligt handilsarbeiði innan sølu av ítróttarútgerð. So ert tú ein m/k, sum hevur áhuga innan hetta økið, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð hjá okkum

Thomas Dam Ítróttur er partur av Intersport- og Sport Direct samtakinum og hava vit 3 ítróttarhandlar í Tórshavn, Glyvrum og Klaksvík.

So ert tú ein fryntlig/ ur persónur við áræði og ikki ert bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur ert tú vælkomin at søkja hetta læurupláss. Lærutíðin er 2 ár við HH prógvi og 3 ár við FHS prógvi.

Umsóknir við prógvum og viðmælum verða at senda til:

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR · Boks 268
FO-100 Tórshavn
ÍTRÓTTUR á Glyvrum · Glyvrarvegur
FO-625 Glyvrar

--- endurlýsing ---

## VENJINGARSKÚLIN

### Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki til næmingar í 6. flokki við serligum tørvi. Talan er um 26 tímar um vikuna.

Løn eftir sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Fyrimun hava umsøkjarar við royndum í mennandi stuðulsarbeiði.

Umsóknin við avriti av møguligum próvskjølum / viðmælum má vera skúlanum í hendi seinast **21. juli 2008.**

Meira fæst at vita við at seta seg í samband við skúlastjóran, Petur Ova Petersen á tlf. 213502.

**Venjingarskúlin**
handan Á 14
Postrúm 59 · 110 Tórshavn

## Frítíðar / familju bátur til sølu

Riviera 925 - flybridge version, árg ´96.
10,25 m langur, 3,20 breiður, 90 cm dýpd.
Allar hentleikar - so sum kaffimaskina, køliskáp, kókiplátur, oljufýr, wc / brúsa, bóvskrúva, el akker, o.a.
8 sitipláss, 5 sovipláss - 2 kømur
motor: 1 volvo penta, kad300, 285 HK, árg ´06 - siglt 275 tímar
Báturin hevur skaða og kann síggjast eftir avtalu eins og á www.huseklepp.net.
nývirði 1.775.000 kr - marknaðarvirði ístandgjørdur ca. 1.200.000 kr.
**- selist fyri nøktandi boð.**

**Um áhugi, so ring 229654**



## Listaframsýning á ólavsøku

Lions Club Tórshavn skipar aftur í ár fyri listaframsýning í Müllers Pakkhúsi á ólavsøku.

**Opið verður 27. – 29. juli.**

Hevur tú hug at taka lut í hesi framsýning, set teg í samband við Lions Club Tórshavn á telefon 211470, 243228 ella 312341 áðrenn 21. juli.

Ágóðin av málningaframsýningini fer til eina ráðstevnu um orðblindni, sum verður 12. september 2008 á Hotel Føroyum.

**LIONS CLUB TÓRSHAVN**

temp-team
VAL AV STARVSFÓLKI & VIKARUM



## Kom og skráset teg

Kundi tú hugsað tær at arbeitt sum vikarur? Ella komið í eitt fast starv?

Vilt tú verða fleksibul og ráða yvir tíðini sjálv/ur?

Vit hava eisini brúk fyri pensionistum og lesandi.

Vit røkka um alt landið.

TEMP-TEAM er eitt vikarbureau.

TEMP-TEAM Føroyar er ein partur av fleiri deildum runt um í Europa og úti í heimi.

Okkara uppgáva er at finna starvsfólk, ið kunnu arbeiða sum vikarar og tey sum vilja koma í eitt fast starv, bæði á sjógvi og landi.

Far inn á heimasíðu okkara **www.temp-team.fo**
TEMP-TEAM, Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn **Tel.: +298 61 61 00**

## FRÁ NES KOMMUNU

Feløg og einstaklingar, sum ætla at nýta fimleikarhøll og svimjihøll skúlans vetrarhálvuna 2008-2009 verða biðin um at senda skrivliga umsókn til:

**Nes kommunu**
Postboks 43
Toftavegur 3
650 Toftir

í seinasta lagi mánadagin 14. juli 2008

**NES KOMMUNA**
nes@nes.fo • www.nes.fo

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY
Nóatún · Boks 3051 · FO-110 Tórshavn

## Starvslýsing

**PhD-verkætlan um góðskuoptimering av fiski og fiskavørum við betri hagreiðing umborð.**

Á granskingarkjarnanum fyri framleiðslutøkni er eitt starv í samband við eina PhD-verkætlan leyst at søkja. Arbeiðsstaður er Fiskirannsóknarstovan. Verkætlanin fer fram í tøttum samstarvi við føroyska fiskivinnu.

Endamálið við PhD-verkætlanini er at skjalprógva góðskuna av fiskinum hjá serliga partrolarunum, við objektivt at máta góðskuna av veiðuni. Hetta skal gerast við at:

- Kannað hvussu hagreiðingin av ráðvøruni umborð ávirkar góðskuna.
- Samanbera optimalt hagreiddan fisk við vanliga hagreiddan fisk.
- Spora hvørja ávirkan hagreiðingin umborð hevur á møguligt vøruúrval, sum fiskurin kann nýtast til.
- Meta um fíggjarligar avleiðingar fyri fiskiflota og framleiðarar, at fiskurin ikki verður optimalt hagreiddur.
- Útgreina møguleikarnar fyri, at bøta um góðskuna av ráverunI, meðan útreiðslurnar samstundis verða hildnar lægri enn økta virði.

PhD-verkætlanin fer fram her á landi eins og á útlendskum universiteti við serkunnleika í góðsku av fiski.

Umsøkjarar skulu hava prógv í viðkomandi fakøki frá universiteti. Tey, ið eru ávegis við at gera kandidatuppgávu, eru eisini vælkomin at søkja.

Setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya.

Meiri fæst av vita um verkætlanina við at venda sær til granskingarleiðaran, Helgi Nolsøe, á teldupostadressuni: helgino@frs.fo ella á 353949.

Umsóknarfreistin er 15. august 2008. Umsóknir við prógvum, ævisøgu (curriculum vitae), viðmælum o. ø. skulu sendast til:

**Granskingarkjarnin fyri framleiðslutøkni,**
Att.: Helgi Nolsøe
C/o Fiskirannsóknarstovan
Nóatún 1
FO 110 Tórshavn
Føroyar

## Listarverk eftir Elinborg Lutzen til sølu

Eitt grafiskt verk -"Við Sandin", 1979, verður selt um hóskandi boð fæst.

*Bill. mrk.....*